# Seyðamenn skoraðu mest

KOMMUNUVAL

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

Tvøroyri: Eitt mál, sum hevur verið frammaliga í valstríðnum á Tvøroyri, er at vetrarfriða Tvøroyri fyri seyð.

Býráðið hevur arbeitt við málinum í fleiri ár, men enn er ikki komið á mál.

Tó er enn gongd á málinum, men kommunan er víðfør og semja skal fáast við nógvar hagar, eins og milliónaupphædd skal latast í endurgjaldi fyri mist vetrarbit.

Tað var eisini bara spurningurin um vetrarbit, sum fekk áhoyrararnar at ressast við á veljarafundinum á Tvøroyri uppundir valið.

Tað er ongin loyna, at Kristin Michelsen, borgarstjóri og Jaspur Vang, nývaldur býráðslimur, hava rættiliga nógvan seyð. Og um tað er rættvíst ella ikki, skulu dagar ikki takast ímillum her, men tað er heldur ongin loyna, at akkurát hesir báðir verða mangan lagdir undir at eiga ein trivaligan part av tí seyði, sum ger sær dælt av tí sum grør ímillum húsini á Tvøroyri.

Men veljarin á Tvøroyri mann hava stórt álit á, at júst hesir báðir eru førir fyri at fáa seyðin úr býnum, tí til stuttleika kann nevnast, at tað vóru hesir báðir, sum fingu nógv flestar atkvøðu til býráðsvalið týsdagin.

Kristin Michelsen var toppskorari við 225 atkvøðum og Jaspur Vang fekk 169 atkvøður og sostatt kom ongin nær í námind av teimum báðum.

# Býráðið hevur slitið tjóðveldið í Vági illa

**Tjóðveldisflokkurin í Vági misti ein mann á býráðsvalinum týsdagin**

BÝRÁÐSVAL

Áki Bertholdsen
áki@sosialurin.fo

Tað skerst ikki burtur, at tjóðveldisflokkurin í Vági hevði stóra afturgongd í býráðsvalinum týsdagin.

Tjóðveldið hevði fýrá býráðslimir, men hesuferð mistu teir fjórða limin til sambandsflokkin og hava sostatt tríggjar býráðslimir. Hinvegin fekk sambandsflokkurin sum sagt, ein afturat og tey eru nú tvey.

Annars varðveittu bæði uttanflokkalistin og javnaðarflokkurin síni bæði umboð í býráðnum.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa orðið á Jògvan Krosslá, borgarstjóran í Vági, áðrenn blaðið fór til prentingar í gjár.

Men næsti maður á listanum var Hans í Líðini og hann heldur, at valúrslitið hjá tjóðveldisflokkinum í Vági er ein avleiðing av politiskum sliti.



Hans í Líðini

Jógvan Krosslá fekk 174 atkvøður á seinasta vali, men hesuferð fekk hann bara 80.

– Tjóðveldisflokkurin hevur havt borgarstjóran í Vági í 12 ár og tað hevur uttan iva kostað í sær sjálvum, heldur Hans í Líðini.

Tað skerst heldur ikki burtur, at vinnuliga hevur staðið illa til í Vági seinastu árini og tað kann eisini hava kostað borgarstjóranum atkvøður.

Men er hetta so, er tað ein stór misskiljing, heldur Hans í Líðini, sum sjálvur er nývaldur í býráðnum.

– Ein kommuna skal ikki reka vinnulív og tí kann tað ikki leggjast kommununi til last, at tað er so lítið arbeiði í Vági.

– Ein kommuna skal skapa karmar og karmar hevur Vágs Kommuna skat so góðar sum nakrastaðni. hava umsóknir verið um vinnuvirkir, hevur kommunan avgreitt umsóknirnar skjótt og væl og niðri á havnalagnum eru umstøðurnar heilt framúr.

– Trupulleikin er, at tað privata vinnulívið manglar pening til at seta naka í verk fyri, sigur nývaldi býráðslimurin í Vági

– Er støðan tann, at borgarin væntar, at kommunan skal hava hava vinnulív, avspeglar tað bara, hvussu vánalig støðan er.

Sjálvur er Hans í Líðini sera bilsin av sínum egna valúrslitið. Hann fekk heilar 76 atkvøður og var sostatt bara fýra atkvøður aftanfyri Jógvan Krosslá.

– Tað var nógv meiri enn eg hevði væntað, sigur hann.

Triði býráðslimurin hjá tjóðveldisflokkinum í Vági, er Dánjal Bjarkhamar.

Sambandsflokkurin fekk ein lim afturat. Ásgerð Stenberg, sum hevur sitið í býráðnum, fær nú Svenning Borg undir liðina á sær.

Hjá javnaðarflokkinum hendi eisini ein broyting við tað, at Páll Augustinussen fall. Ístaðin var Kirstin Strøm Bech vald við stórari undirtøku, tí hon fekk 74 og hon skal nú manna javnaðaflokkin í býráðnum saman við Eyðfinni Mørk. Uttanflokkalistin varðveitti eisini síni bæði umboð. Sølvi Andreasen varð afturvaldur, men Poul Johannus Joensen stillaði ikki uppaftur. Fyri hann varð Poul Augustinussen, valdur.

# Væntaðu at ein skriða leyp

**Hjá borgarstjóranum í Vági kemur afturgongdin á býráðsvalinum týsdagin ikki óvæntað. Men afturgongdin varð størri enn hann stúrdi fyri**

BÝRÁÐSVAL

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



*Tað gekk skjótt at telja atkvøðurnar í Vági.men rúgvan hjá Jògvani Krosslá er nógv minni enn hann plagar at vera (myndina tók Dagfinn Olsen)*

Vágur: Tað kemur ikki óvæntað á Jògvan Krosslá, borgarstjóra í Vági, at hann fekk so stóra afturgongd á býráðsvalinum týsdagin.

À valinum í 2000, fekk borgarstjórin í Vági 174 atkvøður. men hesuferð leyp ein rættilig skrivað og hann fekk ikki meiri enn 80 atkvøður og flokkur hansara, tjóðveldisflokkurin, misti ein býráðslim ognú hevur hann tríggjar.

– Eg havði væntað eina afturgongd. Men eg hevði ikki væntað, at hon varð so stór, sum hon hóast alt varð, sigur hann í eini stuttari viðmerking.

Men hann heldur, at hetta er ein natúrlig gongd.

– Eg havi verið leingi í politikki og har gongur upp og niður. Tað slítur at vera í politikki og tað er heilt naurligt at tað eisini gongur afturá, sigur hann.

Men hann heldur kortini, at uppundir valið hesuferð, hava hermótini verið nokk so greið.

– Tað hevur verið nógv tosað um at flyta miðnámsskúlan í ein depil í Hovi og um kommunusamanlegging. Hetta eru tvey mál, har eg havi havt eina heilt greiða støðu og tað er hann kanska revsaður fyri.

Kortini heldur hann, at í hesum málum hevur hann ikki havt nakað sum helst val.

– Tað hevur verið eitt púra samt býráð í hesum báðum málum. Og hetta hevur eisini verið ein støða, sum eg havi verið púra samdur í.

Men Jógvan Krosslá sigur, at hetta kann hava ført við sær, at vágbingar hava ikki valt so persónligt, sum teir hava gjørt, men at floksatkvøðurnar eru farnar hvør til sítt.

Hvussu samgongan fer at síggja út í næsta valskeiði, hevur hann onki boð uppá í løtuni.

Í hesum valskeiðnum hava allir flokkar verið við samgonguni, tó at tann eini limurin í javnaðarflokkinum, Eyðfinn Mørk, seinni tók seg úr samgonguni aftur.

– Hetta er ein skipan, sum mær hevur dámað sera væl og stendur tað til mín, fáa vit aftur eina samgongu við so nógvum býráðslimum, sum gjørligt.

– Hetta gevur býráðsarbeiðnum eina serliga dimensjón, tí tað gevur øllum møguleikan at ávirka býráðsarbeiðið og tað gevur samtyktum í býráðnum eina serliga tyngd, sigur hann.



# Løgdu seg róliga at sova

**Javnaðarmenn á Tvøroyri kundu róliga tørrna inn eftir kommunuvalið týskvøldið í fullari vissu um, at ongin kundi stjala borgarstjóran frá teimum**

KOMMUNUVAL

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



*Kristin Michelsen hevði alt húski við inn í atkvøðuhøli og tey fylgdu spent við uppteljingini. Og tey vóru lætt um hjartað, tá ið tey fóru avstað aftur, tí hann hevði eitt satt kanónval*

**Tvøroyri:** Er tað nakað, sum er heilt vist eftir býráðsvalið á Tvøroyri týskvøldið, er tað at borgarstjórin tey næstu fýra árini verður javnaðarmaður.

Av teimum sjey býráðslimunum á Tvøroyri, fekk javnaðarflokkurin fýra umboð og kann sostatt skipa meirilutan einsamallir.

Mong mettu, at javnaðarflokkurin spældi við krút, tá ið teir tóku gamla tjóðveldismannin, Kristin Michelsen, upp í flokkin sum jokara til hetta býráðsvalið.

Men teir fingu sanniliga fulla úrtøku burturúr, tí teir fingu ein býráðslim afturat og hava nú fýra og sostatt meiriluta einsamallir.

Ella sum toppskorarin, Kristin Michelsen segði eftir valkvøldið:

– Vit kunnu róliga leggja okkum at sova í kvøld, tí tað hevur í hvussu so er ongin skipa samgongu fyri nøsini á okkum, ímeðan vit liggja í fasta svøvni.

Ì hesum liggur eisini, at javnaðarmenn ætlaðu at taka sær tær stundir sum kravdust, áðrenn teir skipaðu nýtt býráð.

Hóast teir hava møguleikan at skipa samgongu einsamallir, er tað ikki vist, at teir fara at brúka hendan samgongan.

Fleiri aðrir býráðslimir løgdu til merkis, at í sjónvarpinum eftir valið læt Kristin Michelsen dyrnar upp fyri samstarvið tvørtur um floksmark.

Við Sosialin sigur hann, at hetta er ein spurningur, sum skal takast upp við javnaðarfelagið á Tvøroyri.

– Vit hava møguleikan at skipa samgongu einsamallir, men um vit brúka tann møguleikan framum eitt samstarv við aðrar flokkar, er ein annar spurningur. Tað er eitt mál, sum skal viðgerast innanfloks, sigur Kristin Michelsen.

Spurningurin er so, hvør verður borgarstjóri á Tvøroyri.

Kristin Michelsen dylir ikki fyri, at fær hann tilboðið, tekur hann av.

Hinvegin er tað ikki til fyrimuns fyri hann, at hann er kendur tjóðveldismaður, sum er akkurát er komin upp í javnaðarflokkin og tað er onki dulsmál, at tað hóvar summum javnaðarfólkum illa, at tey skulu velja júst hann til borgarstjóra.

Hinvegin kann tað vera trupult at sleppa uttanum hann, tí hann hevði eitt avbera gott val og fekk so nógv flestar atkvøður á javnaðarlistanum. Hann skoraði heilar 225 atkvøður, sum er næstan tríggjar ferðir so nógv, sum hann fekk á seinsata vali. Tað er eisini næstan tríggjar ferðir so nógv sum næsti maðúr á listanum.

Mett verður, at umframt Kristin Michelsen, er besta boðið upp á ein borgarstjóra á Tvøroyri, Pauli Einarsson, sum er næstvaldur á javnaðarlistanum við 87 atkvøðum.

Annars sigur Kristin Michelsen, at tað komandi býráð fer at arbeiða eftir sama leisti sum fráfarandi býráð.

Og hann leggur dent á, at eitt aðalmál hjá komandi býráðssamgonguni verður at lækka skattin, eftir at tey hava havt landsins hægstaskattaprosent í fleiri ár.

### Krevja samanlegging

Annars tulkar Kristin Michelsen valúrslitið í Suðuroynni sum heild, sum eitt tekin um, at suðuroyingar krevja, at kommunupolitikarar skulu meta oynna sum eina eind og skulu virka fyri at leggja kommunurnar saman.

Hann sipar serliga til úrslitið hjá borgarstjóranum í Vági, Jógvani Krosslá, sum gekk nógvar atkvøður aftur. Júst Jógvan Krosslá hevur verið íðin stríðsmaður ímóti at leggja oynna saman í eina kommunu.

– Hetta valið var ein ósigur hjá teimum, sum ikki vilja hava Suðuroynna í eina kommunu.

Tí skilir hann framvegis ikki, at hinar kommunurnar í oynni ikki vildu hava vegleiðandi fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging, eins og tað var í Sumba og á Tvøroyri.

– Royndirnar at savna oynna í eina kommunu fara at liggja frammaliga í arbeiðsskránni hjá nývalda býráðnum á Tvøroyri, sigur Kristin Michelsen.

– Útlitini fyri at samansjóða oynna í eina kommunu er júst tað, sum fer at gera komandi valskeiðið serstakliga spennandi, leggur hann afturat.

# Stórur meiriluti fyri at leggja Suðuroynna í eina kommunu

**Bæði í Sumba og á Tvøroyri er heilt stórur meiriluti fyri at leggja Suðuroynna í eina kommunu**

KOMMUNUSAMANLEGGING

Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo



Bæði Tvørafólk og sumbingar taka so dyggiliga undir við, at Suðuroyggin verður ein kommuna.

Tað er úrslitið av vegleiðandi fólkaatkvøðuni, sum var í sambandi við kommunuvalið týsdagin.

Umframt at velja nýtt kommunustýri, sluppu veljarar í Sumba og á Tvøroyri eisini at atkvøða um teir vildu hava Suðuroynna í eina kommunu ella ikki.

Hetta var ein vegleiðandi fólkaatkvøða, sum Sumbiar Kommuna tók stig til og sum kommunan heitti á allar hinar seks kommunurnar í Suðuroynni um eisini at hava.

Men bara Tvøroyri tók undir við ætlanini.

Tað vóru júst Sumba og Tvøroyri sum arbeiddu við at leggja saman fyri valið, men tey blivu ov sein á sjóvarfallinum og kláraðu ikki at avgreiða tað fyri valið.

Men úrslitið av hesum báðum fólkaatkvøðunum um samanlegging, er ikki til at misskilja.

Í Sumbiar Kommunu atkvøddu 154 fyri at leggja alla Suðuroynna í eina kommunu og 59 atkvøddu ímóti. Sostatt atkvøddu 72, % fyri at leggja alla oynna í eina kommunu.

À Tvøroyri var meirilutin fyri at leggja Suðuroynna í eina kommunu uppaftur greiðari. Har atkvøddu 898 fólk fyri samanlegging og góð160 atkvøddu ímóti.

Tað er ein meiriluti upp á 84%.

Leggjast skal tó afturat, at í báðum støðum vóru nakrar fáar blankar atkvøður. Tað hevur ikki eydnast okkum at fáa tey heilt nágreiniligu tølini, men tað reingist ikki við tann veruleika, at í báðum kommununum var heilt greiður meiriluti fyri kommunusamanlegging.

Jacob Vestergaard, borgarstjóri í Sumba sigur, at tað er ongin ivi um úrslitið.
Og úrslitið er, at sumbingar og tvørafólk vilja hava alla oynna í eina kommunu.

Og Hann heldur, at hetta er eitt úrslit, sum forpliktar kommunustýrini at arbeiða víðari við samanlegging.

Kortini verður tað ikki hansara uppgáva, tí Jacob Vestergaard stillaði ikki uppaftur.

Hann sigur eisini, at ein orsøk til afturgongdina hjá borgarstjóranum í Vági kann vera, at hann hevur havt so greiða støðu ímóti at leggja oynna í eina kommunu, men hann ivast ikki í, at vinnuliga støðan eisini hevur havt sína stóru orsøk.

Hinvegin vísur hann eisini á, at borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen hevur verið heitur forsprákari fyri einari kommunu í Suðuroy og hann hevði eitt kanónval.

– Valúrslitið er rættiliga áhugavert og tað er ongin ivi um, at hetta er ein púra greið ábending um, at ein nógv størri partur av suðuroyingum vil hava alla oynna í eina kommunu, enn vit kanska geva okkum far um, sigur Jacob Vestergaard.